## Ellisakfør til Gjáar

ELLISAKFØR
*tíðindaskriv*

Leygardagin komandi fara ellisakfør útferð til Gjáar. Tað er Føroya Ellisakfør sum skipar fyri útferðini, sum er í sambandi við vikuskiftistúrin, sum foreldrabólkurin hjá krabbameinssjúkum børnum skipar fyri. Tey eru á Gjáargarði við Gjógv hetta vikuskiftið - og ætlanin er, at børnini skulu sleppa túr við ellisakførum hendan dagin við Gjógv.

Ellisakførini fara frá felagshølunum hjá Føroya Ellisakførum yvir við Strond í Havn leygardagin 9. juli kl 15. Ellisakfør, sum koma aðrastaðni frá, kunnu møta við Gjógv. Fleiri upplýsingar kunnu fáast á www.ellisakfor.com ella við at ringja til formannin á tel 228680. Við gjógv fáa fólkini frá Føroya Ellisakførum ein góðan kaffimunn frá foreldrabólkinum.

## Bilasølan rýkur uppeftir

BILASØLA
*Jákup Mørk*

Sammett við juni mánað í fjør, vórðu nærum tvífalt so nógvir persónbilar vórðu innfluttir í juni í ár

Hetta framgongur av hagtølunum hjá Bileftirlitinum, sum skrásetir innflutning av akførum. Í alt vórðu í juni mánaði í ár innflutt 240 akfør mótvegis 152 í juni mánaði í fjør. Serstakliga á persónbilum er talan um stóran vøkstur - 182 mótvegis 104.

Og roknað yvir árið, er talan eisini um ein hampuliga stóran vøkstur. 22,3% fleiri akfør eru innflutt higartil í ár.

Somuleiðis er innflutningurin av prutlum nógv øktur. Higartil í ár eru innflutt 210 prutl, og tað talið skal sammetast við tey 102 prutlini, sum komu til landið í fjør.

At fólk keypa nógvar nýggjar bilar tykist tó eisini merkja, at innflutningurin av brúktum bilum minkar. Her siga hagtølini, at føroyingar higartil í ár hava innflutt 220 brúkt akfør. Talið fyrstu seks mánaðirnar í fjør var 346.

## Villmenn á G!

Herfyri kundu vit avdúkað at størsta tónleikarliga samstarvið í Vágum "Vágaverk" verður at hoyra á ársins G!Festivali. Nú er vorðið kunnugt, at eisini hitt stóra samstarvið í Vágum; "Villmenn" eru við.

Vilmenn vóru bálorkestur á MjúS, og spældu eina rimmar konsert har. Talan er um skitnan kontripunk, sum luktar eitt sindur av Vágasoundi.

Jón Tyril sigur, at tað er ikki orsaka av framførsluni á MjúS, at bólkurin er valdur. Tí avtalan við Villmenn varð gjørd langt áðrenn MjúS.

-nud

## Gongutúrur hvønn leygardag í Suðuroy

GONGUTÚRUR
*tíðindaskriv*

Leygardagin 9. juli skipa kunningarstovurnar í Suðuroy fyri gongutúri úr Víkarbyrgi til Akrar.

Bussur koyrir av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.00 og av Kunningarstovuni í Vági (býráðsskrivstovan) kl. 10.30.

Koyrt verður til Víkarbyrgi og farið verður út um bøgarðin har varðagøtan byrjar. Gingið verður eftir varðagøtuni niðan á fjallið "Brúgvin" (249 m), síðani oman eftir "Akravegnum" framvið Ærgisá og oman til Akrar. Túrurin tekur umleið 1 tíma og er ikki roknaður at verða tungur at ganga.

Staðkent heimildarfólk er við á gonguferðini.

Eftir loknan gongutúr verður koyrt við bussi av Økrum til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági. Vit leggja dent á at allir luttakararnir koyra í bussi frá og til kunningarstovurnar. Soleiðis hevur gongufólki ikki høvuðbrýgg eftir loknan túr, at mugu fara eftir bilinum við byrjunarstaðið fyri gongutúrin.

Bindandi tilmelding til túrarnar skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.

### Gott at hava við!

Havið heit og góð klæði, góðar skógvar ella styvlar, matpakka og ein drekkamunn við. Hevur tú kikara og eitt kort yvir økið har gingið verður við tær, gerst túrurin óivað meiri áhugaverdur.




*Tey tóktust bara hugna sær, nú tá veðrið kortini var somikið gott, at tað nærum ikki var sitandi innandura*

*Mynd: Símun J. Hansen*

# Øðrvísi skrivstovuarbeiði

VERKFALL

Eisini bankarnir vórðu raktir, nú SEV um vikuna gjørdi av at skamta við streyminum. Uttan teldur og netsamband var ikki stórt, sum kundi fáast frá hondini, og so hildu tey flestu kanska, at nakrar róligar fríløtur vóru á skránni.

Men ikki hjá Føroya Banka í Runavík. Leivur Højgaard, deildarleiðari, helt í øllum førum, at nakað kortini kundi gerast til nyttu. Tí vórðu øll starvsfólkini eina løtu send uttar í tún at hampa um blómubedini, sum eru framvið bankanum. Og hóast fríløtan soleiðis varð av ongum, so mundu starvsfólkini einki sum helst hava ímóti hesum alternativa formi fyri skrivstovuarbeiði. Í øllum førum tóktist lagið vera gott, tá myndamaðurin kom fram við týsdagin.

**-jm**

# Schneider í Smiðjuni

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 7. juli kl. 16.00 letur upp ein framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í Havn við fotomyndum hjá Olav Schneider. Sýningin ber heitið *»Heystsuita« – ein søga um slakt – ein søga um børnini.*

### *Heystsuita*

*Lívsins andadráttur*
*ættarinnar andadráttur*

*Børnini*
*speglingin av tí farna*
*og tí komandi*
*Brúgvin*

*Lat tey glógvandi eygu*
*leiða okkum inn í núið*
*hygg við teirra eygum*
*síggj við teirra eygum*

*Hvat síggja tey? Hvussu*
*síggja tey? Minnist tú?*

*Minnist tú myrkrið?*
*Heystið?*

*Guvan í kjallararúmi*
*vásaklæddir menn, sum*
*biðja tey smáu bíða*
*uttanfyri,*
*meðan svævað verður.*

*Blóðið! Sveitin!*
*Deymurin,*
*dampandi blóð.*

*Barnið, sum við*
*alspentum sonsum fylgir*
*hvørji rørslu*

*meðan urheimur*
*fullur av vitan*
*letur seg upp.*

*Vitan um lív og*
*ósvitaligan deyða*

*og mammubeiggin*
*við skálkabrosi:*
*»Tí hvør av øðrum*
*liva má …»*



*Soleiðis skal lítlin*
*læra lívsins treytir.*
*Í spølni og kæti*
*og djúpum álvara –*
*eygleiða tey vaksnu*
*gera sum tey vaksnu.*

*(Brot úr yrking eftir Sonju Schneider)*

Heystsuita er ein søga um slakt; men hon er fyrst og fremst ein søga um børnini. Hvat síggja barnaeygu? Hvat uppliva børnini? Hvussu luttaka tey í hesum serliga universi, sum eitur slakt? Hvusus hava tey tað saman við teimum vaksnu? – Í Kaldbak verða tey tíðliga tikin upp í arbeiðið við slaktinum.

Her er eisini ein spurningur um samleika – hvussu er samleikin hjá hesum børnunum samanborin við tann hjá børnum í býarumhvørvi?

Myndirnar eru tiknar í Kaldbak, Kaldbaksbotni og á Sundi í tíðarskeiðnum 2001–2004.

Á sýningini eru 48 svart/hvítar fotomyndir.

Sýningin er í húsinum til mikudagin 13. juli, og opið er hvønn dag frá kl. 11–18, sunnudag tó frá kl. 13–18.

Í døgunum 5.–31. august verður sýningin at síggja í Leikalund í Klaksvík.